# Tarira í Vesturkirkjuni

TÍÐINDASKRIV



*Júst heimkomið aftur á klettarnar av norðurlandaferð, fer kórið Tarira at hava konsert í Vesturkirkjuni sunnukvøldið 10. apríl kl.19.30. Kórið hevur á ferðini havt konsertir í Göteborg, Stockholm, Jomala í Álandi, og í Keypmannahavn. Konsertirnar vóru sum heild væleydnaðar. Tey, ið vóru og lurtaðu, lótu væl at; eitt nú rósti kendi svenski kórmaðurin Gunnar Eriksson kórinum fyri framførsluna av tí ekspressiva, dramatiska verkinum "En ny himmel och en ny jord" hjá Svend-David Sandström. Eitt stórverk, sum kórið veruliga hevur tikið til sín.*

Tað var ein stór uppliving at framføra í elligomlu Skt. Olavs Kyrka, ið varð bygd uml ár 1200 á Álandi. Ljóðviðurskiftini í kirkjuni vóru sera góð og haraftrat hevði kórið eina serliga frumframførslu á skránni. Verkið "Herrens Bön" skuldi framførast fyri fyrstu ferð, hóast tað er skrivað í 1998. Álendska tónaskaldið Kjell Frisk var sjálvur hjástaddur á hesi konsertini, og hann tóktist bæði hugtikin og rørdur av framførsluni hjá føroyska kórinum. Eitt annað hæddarpunkt á ferðini var konsertin í stásiliga veitslusalinum í Ny Carlsberg Glyptotek. Eisini her var akustikkurin góður, men tað allarbesta var tað nógva fólki, sum hevði leitað sær til konsertina. Nú ferðin er komin at enda, gleða kór og kórleiðari seg til framførsluna á heimavølli í Havn, har kórið heldur til.

Skráin í Vesturkirkjuni verður hin sama sum á ferðini og tessvegna fáa áhugað her á landi høvi at uppliva kórið saman við kórleiðaranum Sunleif Rasmussen framføra eina skrá, ið er samansett av norðurlendskum modernaðum tónleiki við serligum denti á føroysk verk. Føroyska tilfarið fevnir bæði um nýggjari verk so sum "Mörkret taler til den blommande busken", ið ein av kórlimunum, Pauli Hansen hevur skrivað við støði í yrking hjá William Heinesen og um nýklassikarar sum "Blátt" hjá Sunleif Rasmussen við teksti eftir Steinbjørn B. Jacobsen. Herumframt fer Tarira eisini at framføra "Pater Noster", eitt longri verk fyri tvey blandað kór, sum Bjarni Restorff skrivaði í 2001.

Kórið Tarira er til konsertina í Vesturkirkjuni mannað við somu royndu sangarunum sum á ferðini. Hesi eru: Sopran: Joanna Johansen, Berghild Poulsen, Malan Hansen, og Urd Johannesen. Alt: Pìl Reinert, Gunnvør Poulsen, Durita Eliasen, Elspa Samuelsen og Kinna Poulsen. Tenor: Peter Hentze Niclasen, Hans Debes, Pauli Hansen, Allan Dalsgarð og Herluf Lützen. Bass: Høgni Debes, Eyðun Eliasen, Andrias Petersen, Niels Winther og Fróði Sandoy. Tað er umráðandi, at oyrini fáa sítt, tá talan er um kórkonsertir, men okkurt verður eisini til eyguni. Kórið bílegði nevniliga í sambandi við norðurlandaferðina búnar frá sniðgevanum Onnu Kristin Bæk.

Hesi hava stuðlað Norðurlandaferðini hjá Tarira: NOMUS, Norðurlandahúsið, ið fyriskipar konsertina í Vesturkirkjuni, Mentanargrunnur Landsins, Føroya Banki, Dansk-Færøsk Kulturfond, Tórshavnar Kommuna og Føroya Sparikassi.

## VEÐRIÐ




**Veðrið í dag:**
Hvassur vindur ella skrið av norði, 13 til 18 m/s. Skýggjað og kavaælingur. Hitalagið millum –3 stig og +1 stig.




**Fríggjadagin**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av norði og útnyrðingi 10 til 15 m/s. Skýggjað og kavaælingur. Hitin um frostmarkið




**Leygardagin**
Gul til stívt andøvsgul, 5 til 10 m/s. Skýggjað og hitin millum 2 og 6 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -6 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 3 |
| Ammassalik | -2 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 2 |
| Seyðisfjørður | -1 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 11 |
| Tromsø | 6 |
| Bergen | 4 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 10 |
| Keypmannah. | 11 |
| Helsinki | 7 |
| Moskva | 12 |
| Berlin | 10 |
| Warzawa | 18 |
| Kiev | 16 |
| Bukarest | 13 |
| Paris | 12 |
| Madrid | 17 |
| Róm | 16 |
| Malorca | 20 |
| Athen | -- |
| Malta | 15 |
| Tunis | 13 |
| Beijing | 26 |
| New Dehli | 36 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 22 |
| New York | 15 |
| Miami | 24 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 33 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 23 |

## LUFTTRÝSTIÐ





## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 5/4 kl. 06[00]– 6/4. 06[00]. Hitin í gjár: 4,5°
Minsti hiti máldur í apríl: -9,9° - Mesti hiti máldur í apríl: 18,3°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 3,3 mm – mált frá 5/4 kl. 06[00]– 6/4 kl. 06[00]
Avfallið higartil í apríl: 19,1 mm

## Vika 13 – 3. apríl

1. Centrum:
**09 - 41 - 01 - 33 - 14 - 16 - 11 - 27 - 23 - 58 - 30 - 28 - 55**

1. Ramme:
**46 - 03 - 45 - 12 - 08 - 21 - 53 - 24 - 42 - 17 - 67 - 56 - 44 - 50 - 29 - 49 - 19 - 07 - 71 - 02 - 32 - 60 - 59 - 48 39 - 35 - 37 - 57 - 26 - 38 - 70 - 54 - 31 - 20 - 75 - 40 - 74**

Fuld plade:
**66**

Fri spil: **_O_EN**

| | | |
|---|---|---|
| Fuld plade: | 1. pr. | **69.456,- kr.** |
| 1. Ramme: | 2. pr. | **8.010,- kr.** |
| 1. Centrum: | 3. pr. | **2.424,- kr.** |
| Ramme: | 4. pr. | **1.626,- kr.** |
| Centrum: | 5. pr. | **0,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## TIPS 12 úrslit
### Vika 13 – 3. apríl

| | | |
|---|---|---|
| 1. | FC Nordsjælland - Herfølge | x |
| 2. | OB - FC København | 2 |
| 3. | Randers FC - AGF | 1 |
| 4. | Viborg - AaB | 1 |
| 5. | West Bromwich - Everton | 1 |
| 6. | B.M'gladbach - Bochum | x |
| 7. | Dortmund - Hertha Berlin | 1 |
| 8. | Cagliari - Sampdoria | x |
| 9. | Reggina - Parma | x |
| 10. | Udinese - Roma | 1 |
| 11. | FC Barcelona - Betis | x |
| 12. | Levante - Dep. La Coruna | 2 |

**Prognosa:**

| | |
|---|---|
| 12 røtt: | **Eingin/0,- kr.** |
| 11 røtt: | **11.328,- kr.** |
| 10 røtt: | **993,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## VESTFALLSKYRRINDI

7. apríl

2. apríl Seinna kvarter
4. apríl Mánin næstur jørðini
8. apríl Tendring

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | Suðuroyar-/Vágafirði sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | Hestfirði/Sundalagnum sp. | Vestmannasundi fp. | Vestmannasundi sp. | Mykinesfirði fp. | Mykinesfirði sp. | Nólsoyarfirði fp. | Nólsoyarfirði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp. | Hvannasundi fp. | Hvannasundi sp. | Fugloyarfirði fp. | Fugloyarfirði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7. apríl | 06.14 | 18.37 | 05.14 | 17.37 | 05.29 | 17.52 | 08.14 | 20.37 | 09.14 | 21.37 | 04.29 | 16.52 | 03.29 | 15.52 | 06.29 | 18.52 | 07.29 | 19.52 | 05.59 | 18.22 | 07.14 | 19.37 |
| 8. apríl | 06.59 | 19.22 | 05.59 | 18.22 | 06.14 | 18.37 | 08.59 | 21.22 | 09.59 | 22.22 | 05.14 | 17.37 | 04.14 | 16.37 | 07.14 | 19.37 | 08.14 | 20.37 | 06.44 | 19.07 | 07.59 | 20.22 |
| 9. apríl | 07.44 | 20.07 | 06.44 | 19.07 | 06.59 | 19.22 | 09.44 | 22.07 | 10.44 | 23.07 | 05.59 | 18.22 | 04.59 | 17.22 | 07.59 | 20.22 | 08.59 | 21.22 | 07.29 | 19.52 | 08.44 | 21.07 |
| 10.apríl | 08.30 | 20.53 | 07.30 | 19.53 | 07.45 | 20.08 | 10.30 | 22.53 | 11.30 | 23.53 | 06.45 | 19.08 | 05.45 | 18.08 | 08.45 | 21.08 | 09.45 | 22.08 | 08.15 | 20.38 | 09.30 | 21.53 |
| 11.apríl | 09.17 | 21.41 | 08.17 | 20.41 | 08.32 | 20.56 | 11.17 | 23.41 | - | 12.17 | 07.32 | 19.56 | 06.32 | 18.56 | 09.32 | 21.56 | 10.32 | 22.56 | 09.02 | 21.26 | 10.17 | 22.41 |

5 707265 100043 >